Terje B. Vestergaard **Nr. 19/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um ljóð- og luftdálking fram við føroysku havnunum, settur landsstýrismanninum í umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at leggja uppskot fyri tingið viðvíkjandi ljóð- og luftdálking?
2. Hvørjar fíggjarligar avleiðingar fær eitt slíkt uppskot fyri t.d. kommunurnar?
3. Nær kann tað hugsast, at eitt slíkt uppskot verður klárt at leggja fyri Løgtingið?

Viðmerkingar:
Ljóð- og luftdálking frá havnaløgunum og skipum hevur verið meira og meira umrøtt millum fólk, og tey hava tikið seg saman at stovna eitt felag, hvørs høvuðsendamál er at virka fyri, at lóggivið verður soleiðis, at Føroyar gera sum grannalondini og áseta krøv til dálking frá skipum.

Í 2017 segði landsstýrismaðurin í undanfarnu samgongu, at um kommunurnar ikki seta hámarksvirði fyri óljóð og dálking frá skipum, mátti landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum seta átøk í verk fyri at verja borgaran. Hetta varð endurtikið í 2018.

Tað má metast rímiligt, at ásetingar fyri óljóð og dálking frá skipum verða eins fyri allar kommunur í landinum sum varða av havnunum.

Hetta er orsøkin til hendan spurning.

Á Løgtingi, 14. november 2019

Terje B. Vestergaard